## UTTAN ÚR HEIMI

## Nærri Norðurkorea

Amerikanska verjumálaráðið hevur gjørt av at senda 24 bumbuflogfør og fleiri hermenn til leiðirnar í vestara parti av Kyrrahavinum. Endamálið er at styrkja tær amerikansku herdeildirnar, sum hava støð í Suðurkorea.

Amerikanska avgerðin er tikin, eftir at fýra norðurkoreansk jagaraflogfør steðgaðu einum amerikanskum kanningarflogfari yvir Japanska Havinum seinasta sunnudag. Amerikanarar siga, at kanningarflogfarið var 225 kilometrar frá norðurkoreansku strondini, og at eitt av teimum norðurkoreansku flogførunum var minni enn 20 metrar frá kanningarflogfarinum.

Stjórnin í Washington skýrir framferðina hjá norðurkoreansku flogførunum skilaleysa. Amerikanararnir siga eisini, at norðurkoreanska tiltakið var fyrireikað, tí vanliga flúgva norðurkoreansk stríðsflogfør ikki so langt úr landi.

## Feldur av telduposti

Tað var eftirlit við telduposti, sum gjørdi, at pakistansku og amerikansku myndugleikarnir fingu fatur á yvirgangsmanninum Khalid Sheikh Mohammed í pakistanska býnum Rawalpindi.

New York Times veit at siga frá keldum í CIA, at amerikanska fregnartænastan helt eftirlit við telduposti til ein mann, sum var staddur í Rawalpindi. Maðurin æt Mohammed Omar Abdel Rahman, og er sonur ein blindan egypta, sum í 1995 varð dømdur fyri at hava havt ætlanir um eina bumbuatsókn at ST-húsunum í New York. Tá pakistanska fregnartænastan fór til bústaðin hjá manninum, funnu teir eisini Khalid Sheikh Mohammed har, skrivar New York Times.

Blaðið veit eisini at siga, at CIA hevur verið í hølunum á Khalid Sheikh Mohammed seinastu tíðina. Tann 13. februar var tað um reppið, at hann varð tikin, men tað eydnaðist honum at sleppa til rýmingar, skrivar blaðið.

## Hópmorð skal kannast

ST hevur gjørt av at kanna skuldsetingar um, at ugandiskir hermenn vóru uppi í einum hópmorði, tá 467 óvápnað fólk vórðu tikin av døgum har eysturi í Kongo 24. og 25. februar.

Ein uppreistrarfelagsskapur í Kongo vil vera við, at ugandiskir hermenn tóku lut í hópmorðinum, sum var í einum landsparti tætt við ugandiska markið. Herfyri lovaðu grannalondini hjá Kongo at taka sínar hermenn úr landinum, men ST sigur, at hermenn úr Uganda og Rwanda eru framvegis í Kongo.

Borgarakríggj hevur verið í Kongo seinastu fýra árini, og hildið verður, at kríggið hevur kostað meiri enn tvær milliónir mannalív. Í fjør eydnaðist tað at fáa partarnar at góðtaka ein friðarsáttmála, men bardagarnir hava hildið fram kortini.

## Alt ov stór lønarhækking

Bæði fakfeløg og politikarar í Noregi eru í øðini, eftir at tað er komið fram, at aðalstjórin í Norsk Hydro fekk eina rættiliga munagóða lønarhækking í fjør.

Í fyrralagi fekk aðalstjórin, Eivind Reiten, 550.000 krónur í lønarhækking í fjør, men oman á tað fekk hann 630.000 krónur í samsýning fyri tað góða úrslitið, sum felagið hevði. Við hesum báðum ískoytunum fór árslønin hjá aðalstjóranum upp á 4,2 milliónir krónur.

Ansgar Gabrielsen, vinnumálaráðharri, er í øðini um lønarhækkingina hjá Hydro-stjóranum. Ráðharrin vísir á, at vinnulívið hevur játtað at byrgja upp fyri lønarhækkingum í framleiðsluvinnuni, og tí heldur hann, at nevndin í Norsk Hydro hevur brotið hesa avtaluna. Eisini fakfeløgini eru í øðini. Tey siga, at tað ber ikki til at eggja limunum til afturhald í lønarkrøvunum, tá leiðslurnar í vinulívinum fara tann øvugta vegin.

# Rakettverjuætlanin hjá USA kann elva til spenning millum Danmark og Grønland



*Nú er aftur politiskur spenningur um radarstøðina í Thule - hesaferð í sambandi við amerikansku rakettverjuætlanina.*

**Amerikanska ætlanin at nýta Thule-radaran sum lið í teirri ætlaðu rakettverjuskipanini kann fara at tyngja viðurskiftini millum donsku stjórnina og grønlendska heimastýrið.**

RAKETTVERJUÆTLAN
*Árni Joensen*

Danska stjórnin boðaði fyrradagin frá, at hon tekur undir við ætlanini hjá amerikansku stjórnini um eina rakettverjuskipan, og at amerikanarar sleppa at nútímansgera radaran í Thule, so hann verður ein liður í skipanini.

Danska stjórnin hevur lovað USA svar innan í summar, og tann næsta mánaðin verða fleiri samráðingar- og kunningarumfør millum Danmark og Grønland. Per Stig Møller, uttanríkisráðharri skal til Grønlands, og somu leið skulu uttanríkispolitiska nevndin og verjupolitiska nevndin hjá Fólkatinginum. Uppgávan hjá donsku politikarunum verður at fáa eina semju við grønlendingar um Thule-radaran.

Grønlendingar hava ikki víst amerikanska áhuganum fyri Thule-radaranum aftur, men heimastýrið hevur gjørt greitt, at verjuavtalan frá 1951 skal endurskoðast, og at heimastýrið skal sita við samráðingarborðið og fáa sína ávirkan á úrslitið. Hesum hevur USA víst aftur. Tað gjørdi Colin Powell, uttanríkisráðharri í vetur. Hann gjørdi tá greitt, at tað er ikki neyðugt at endurskoða sáttmálan, tí møguligar broytingar kunnu gerast í ískoytissáttmálum.

Men fyribils halda grønlendingar fast um kravið um at endurskoða sáttmálan. Lars Emil Johansen, fólkatingsmaður, segði í Keypmannahavn fyrradagin, at hetta er framvegis eitt grønlendskt krav.

### Eisini pengar

Hjá grønlendingum hevur tað ikki einans týdning at fáa ávirkan á ein nýggjan verjusáttmála. Málið snýr seg eisini um pengar. Formaðurin í uttanríkispolitisku nevndini hjá Landstinginum, Jensine Berthelsen, segði við grønlendska útvarpið herfyri, at sleppa amerikanarar at útbyggja støðina í Thule, noyðast teir eisini at lata grønlendingum okkurt afturfyri.

Grønlendska sjálvsstýrisnevndin hevur mett, at tann grønlendski búskapurin fær einar 100 milliónir krónur burtur úr Thule-støðini um árið, men fleiri grønlendskir politikarar hava bent á, at hetta er ikki nóg mikið. Hetta var eisini á borðinum, tá Per Stig Møller og Josef Motzfeldt hittu Colin Powell í desember.

Men í frágreiðingini um rakettverjuskipanina ávarar danska stjórnin grønlendingar ímóti at krevja ov nógv. Í frágreiðingini stendur, at grønlendingar eiga at hava í huga, at USA kann velja at fara aðrar vegir.

### Nógv virksemi

Danska stjórnin hevur lovað amerikanarum endaligt svar um Thule-radaran innan í summar, og næstu mánaðarnar verður málið dúgliga umrøtt.

Í næstu viku fer grønlendska heimastýrið undir eitt kunningarátak um rakettverjuætlanina. Samstundis vitjar Per Stig Møller, uttanríkisráðharri í Nuuk, har hann skal hitta Hans Enoksen, landsstýrisformann, eins og hann skal lurta eftir einum trygdarpolitiskum aðalorðaskifti í Landstinginum.

Síðst í hesum mánaðinum fer uttanríkispolitiska nevndin hjá Fólkatinginum til Grønlands, og fyrst í næsta mánað fer verjunevndin eisini til Grønlands. Seinni í næsta mánað verður ein hoyring í Fólkatinginum um rakettverjuætlanina. Eisini í Nuuk verður hoyring um evnið.



## NØVN Í VIKUNI

## Johan Simonsen 75 ár



Mánadagin 3. mars bleiv Johan Simonsen bilførari í Havn 75 ár. Johan er føddur og uppvaksin á Skarvanesi. Í 1945 flutti hann til Havnar. Hann koyrdi bil hjá pápanum, Mortan Simonsen og seinni á Bilstøðini í J.C. Svabosgøtu. Hann var ein av fyrstu partaeigarunum í bilstøðini Taxa, sum bleiv stovnað í 1952 og skifti navn til Auto í 1955. Johan giftist í 1958 við Annu, dóttir Karl hjá Lang-Harald, úr Havn, og eiga tey tríggjar synir og eina dóttir. Anna og Johan hava seinnu árini búð á Argjum. Johan er enn ein av bilførarunum í Auto.

**mg**

## Georg Suðurgarð leiðari á Skeiðsdeplinum



Tann 1. mars bleiv Georg Suðurgarð settur í starv sum leiðari fyri Skeiðsdeplinum við Marknagil í Havn. Georg, ið er 58 ára gamal, er dani, føddur í Ålborg. Hann kom til Føroyar fyrstu ferð í 1988, tá hann bleiv settur sum stjóri á P/F Data. Seinni hevði hann sína egnu fyritøku, P/F Rittin Virkisráðgeving, í Havn. Í 1993 flutti hann til Danmarkar, har hann hevur arbeitt á Ledelsesakademiet á Århus Købmandsskole. Georg er útbúgvin merkonom og lesur í løtuni til "Master i organisatorisk læring" við Ålborg Universitet. Seinnu árini hevur hann undirvíst í diplomleiðaraútbúgvingum. Georg er giftur við føroyskari konu, Poulinu, f. Olsen, úr Fuglafirði. Tey búgva í dag á Skála.

Skeiðsdepililin (SDM) er undirskipaður Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla í Havn.

Uppgávna hjá leiðaranum er t.d. at hava fíggjarligu leiðsluna og umsitingina av deplinum, at menna depilin og leggja skeiðini til rættis. Skeiðsdepilin kemur nú at gera meira við leiðaraútbúgvingar.

**mg**

## Opið hús á Tekniska Skúla



*Egon Øregaard stjóri á Tekniska Skúla*

Týsdagin 4. mars, frá kl. 18-20, var opið hús á Tekniska Skúla í Smiðjugerði í Havn. Skúlin bjóðaði meistarum, foreldrum, teimum ungu og annars øllum áhugaðum at vitja skúlan. Kvøldið byrjaði við, at skúlastjórin Egon Øregaard og Lis Helgadóttir lestrarvegleiðari greiddu frá um skúlan og útbúgvingarmøguleikum á skúlanum. Síðan varð víst runt á teimum ymisku deildunum í Smiðjugerði. Skúlin hevði vanliga praktiska undirvísing hetta kvøldið. Vitjað varð á bildeildini, hárfríðkanardeildini, timburdeildini, smiðjudeildini, maskindeildini og har sum framleiðslutøkningarnir halda til. Kvøldið endaði við einum drekkamunni á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin.

**mg**

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

## Fólk í tíðindunum



**Annlis Bjarkhamar**

Annlis Bjarkhamar er nú fyrrverandi landsstýriskvinna í mentamálum.

Hon er fimtanda landsstýrisfólkið undir Anfinni Kallsberg, sum hevur rátt fyri borgum seinastu fýra árini og níggju mánaðirnar.

Annlis er ikki gomul í landspolitikki – hon hevur enn ikki stillað upp til val, men tá Tjóðveldisflokkurin skuldi kjósa sær landsstýrisevni eftir seinasta løgtingsval, varð tann tá 28 ár gamla Annlis Bjarkhamar kosin at umboða flokkin.

Annlis Bjarkhamar er dóttir Irdi, fødd Hjelm, og Dánjal Bjarkhamar í Vági. Hon er fødd 20. januar í 1974, og hon býr saman við Ian Luid úr Fuglafirði.

Tá Annlis gjødist landsstýriskvinna fyri níggju mánaðum síðani, var hon um at verða liðug við læraraútbúgving sína, tó at hon í onkrum umførum hevur havt farloyv frá læraraskúlanum. Henni vantaði tvær próvtøkur.

Í Sosialinum í gjár nevndi hon, at hon helst fór at gera seg lidna við læraraútbúgvingina – so til skúlaársbyrjan kann onkur av teimum hart kroystu skúlastjórunum gleða seg til at fáa ein fyrrverandi arbeiðsgevara hjá sær í starv sum lærari – og teimum er stórur tørvur á í føroyska fólkaskúlanum.

Annlis hevur starvast sum læraravikaur áðrenn hon fór á læraraskúla. Skúlaárið 96/97 var hon læraravikarur í Porkeri. Í Eysturskúlanum var hon vikarur skúlaárið 01/02, og hon hevur eisini starvast sum útvarpskvinna í tíðarskeiðinum 1997/2000.

Hóast Annlis ongantíð hevur stillað upp til val, so hevur hon verið aktiv í politikki í fleiri ár. Hon var drívmegin í Unga Tjóðveldinum, sum rættuliga fekk vind í seglini aftur við fullveldispolitikkinum, sum formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, fekk í ljósmála.

Annlis Bjarkhamar hevur eisini verið umboð í aðalstjórn Tjóðveldisfloksins árini 1998/2001, og hon gjørdist limur í floksstjórnini í 2000.

## Jens Erik Magnussen 50 ár



Mikudagin 26. februar varð Jens Erik Magnussen í Miðvagi 50 ár. Jens Erik er føddur og uppvaksin í Miðvági. Hann útbúgvin bankamaður og lærdi í Sjóvinnubankanum, har hann arbeiddi til frá 1971-89. Í 1989 fekk hann starv í Landsbanka Føroya, har hann er undirstjóri. Hann hevur verið limur í Fótbóltssambandi Føroya síðan 1978 og formaður í Landsliðsnevndini, síðan hon varð stovnað síðst í 80-unum. Jens Erik er giftur við Daniu, f. Joensen, úr Miðvági. Tey búgva í Miðvági og eiga børnini Miriam og Jonhard

**mg**